ÍF-KÍ:

# Bæði skulu reisast

**Eftir eyðmýkingina mikukvøldið skulu fuglfirðingar taka sær um reiggj. Men teir eru ikki teir einastu við slíkum ætlanum**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*

Hóast tað enn ikki hevur eydnast at fáa ein sigur til høldar hjá nýggja KÍ-venjaranum, so hevur hann framvegis gott mót, nú farið verður til Fuglafjarðar.

Tað kann eisini staðfestast, at venjarin enn hevur havt sera lítlan møguleika at arbeiða við spælarunum, tí við kompaktu dystarskránni, sum nú er, hevur talan bert verið um tvær venjingar.

- Tað er sjálvandi altíð keðiligt at koma til mitt í einum kappingarárið, og akkurát nú er tað kanska enn truplari. Spælararnir hava jú arbeitt eftir eini ætlan saman við fyrrverandi venjaranum, men eg eri ein annar persónur við øðrum hugskotum, og tað mugu vit so venja okkum við, heldur hann.

Men hevur tú nakran møguleika at fáa hesi nýggju hugskotini potað inn í spælararnar við so stuttum skotbráði?

- Tað er í øllum førum trupult. Venjingarnar eru jú sera fáar, so tað hevur mest verið við at tosa og tekna upp á taktik-talvuna, at hetta hevur verið gjørt. Serliga í seinna hálvleiki móti EB/Streymi haldi eg eisini, at spælararnir førka seg móti konseptinum, sum teir áður hava arbeitt við, men tað er ikki meira enn náttúrligt.

Júst dysturin móti EB/-Streymi tykist eisini iðra Oddbjørn nakað. Her heldur hann, at teir høvdu fatur í fleiri góðum tingum, men stig gjørdist talan kortini ikki um.

- Tað er jú ein spurningur um at fáa viðvind. Eg ivist ikki í, at ein sigur seinast kundi givið eitt ordiligt lyft, men tað mugu so arbeiða fram ímóti hesaferð. hugburðinum hjá spælarunum bilar so í øllum førum einki. Teir hava arbeitt sera væl, og eg ivist ikki í, at vit fara at førka okkum upp á talvuna.

### Vinstri bakkarnir mangla

Til dystin mánadagin noyðist Oddbjørn í øllum førum at vera Eyðun Klakstein fyriuttan. Bakkurin fór út við skaða móti EB/Streymi, og tað ganga í øllum førum nakrar vikur, áðrenn hann er tøkur aftur.

*Er tað gott ella ringt fyri tykkum, at ÍF kemur beint frá einum ordans lúsingi í Gundadali?*

- Tað er vónleyst at siga. Tað kann virka báðar vegir. Tað er jú væl hugsandi, at teir nú skulu prógva, at hetta í øllum førum ikki skal henda aftur. Hinvegin kann jú eisini hugsast, at vit við einum skjótum máli kunnu punktera teir fullkomuliga, men tað er vónleyst at gita um, heldur hann.

Úr Fuglafirði vóru boðini eftir mikukvøldið, at teir so í øllum førum skulu reisa seg. Til hesa uppgávuna hevur Petur Simonsen væntandi allar mans tøkar. Spurningurin er tó, hvussu verður við Fritleif í Lambanum. Hann fór út við skaða móti HB, og spurningurin er so, um hann er tøkur mánadagin.



*Í fjør vann KÍ stórsigur á einum kreppuraktum ÍF-liði, men tað er ikki nógv, sum í løtuni talar fyri eini endurtøku av hesum*

EB/S-VB:

# Ræður um at lætta sær á

**Bæði EB/Streymur og VB hava stóran tørv á stigunum mánadagin, um tey skulu klintra upp á stigatalvuni**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*

Málið hjá vágbingum undan kappingarárinum var púra greitt, at nú var tíðin komin at spæla eitt nýtt lið saman. Ættarliðsskiftið, sum hevur verið spakuliga ígongd seinastu trý árini, er nú mest sum totalt, og av gomlu garðuni er tað bara Bjarni Johansen, sum enn er eftir.

Hinvegin høvdu tey í Vági helst vónað, at hetta ikki skuldi merkjast heilt so væl á stigtatalvuni, sum tað hevur gjørt higartil. Spælið hevur kanska eisini verið til meira, men persónlig mistøk í verjupartinum hava kostað dýrt.

Sum skilst úr Vági, so verða allir spælarar tøkir mánadagin. Spurningurin er so, hvørt talan verður um nakrar umskipanir. Kanska mest fyri at bøta um úrtøkuna longur frammi á vøllinum. Tað hevur ljóðað, at arbeitt verður við at fáa útlendskan styrk til álopsplássini, men enn er í øllum førum komið stutt við hesum.

Hjá EB/Streymi tykist tað bara vera Egil á Bø, sum ivi er um. Hann breyt armin fyri viku síðani, og enn er hann so ikki tøkur. Hinvegin er hugaligt hjá venjaranum, at Jákup Martin Joensen loksins tykist vera komin í ordiliga venjing. Hann varð í alt fjør darvaður av skaða, og tó at hesin nú er burtur, so tekur tað sína tíð, áðrenn venjingarstøðan er heilt í toppinum eftir ein slíkan umgang.



*Vágbingar hava staðið seg væl á útivølli, og enn hevur EB/Streymur ikki vunnið heima í ár*

**Formula-deildin**

| | dystir | v - j - t | vu. mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 B36 | 8 | 5 - 2 - 1 | 12 | 3 | 9 | 17 |
| 2 Skála | 8 | 4 - 3 - 1 | 18 | 11 | 7 | 15 |
| 3 HB | 8 | 5 - 0 - 3 | 24 | 12 | 12 | 15 |
| 4 NSÍ | 8 | 3 - 4 - 1 | 14 | 9 | 5 | 13 |
| 5 ÍF | 8 | 3 - 3 - 2 | 12 | 17 | -5 | 12 |
| 6 TB | 8 | 2 - 3 - 3 | 7 | 10 | -3 | 9 |
| 7 EB/Streymur | 8 | 2 - 3 - 3 | 7 | 13 | -6 | 9 |
| 8 KÍ | 8 | 2 - 2 - 4 | 10 | 13 | -3 | 8 |
| 9 VB | 8 | 2 - 1 - 5 | 4 | 12 | -8 | 7 |
| 10 GÍ | 8 | 1 - 1 - 6 | 9 | 17 | -8 | 4 |

**Støðan, 2. deild menn**

| | dystir | v - j - t | vu. mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 B68 | 2 | 2 - 0 - 0 | 4 | 0 | 4 | 6 |
| 2 Royn | 2 | 2 - 0 - 0 | 3 | 1 | 2 | 6 |
| 3 HB | 2 | 1 - 0 - 1 | 7 | 4 | 3 | 3 |
| 4 B71 | 2 | 1 - 0 - 1 | 6 | 4 | 2 | 3 |
| 5 Sumba | 2 | 1 - 0 - 1 | 11 | 10 | 1 | 3 |
| 6 LÍF | 2 | 1 - 0 - 1 | 8 | 8 | 0 | 3 |
| 7 AB | 2 | 1 - 0 - 1 | 2 | 2 | 0 | 3 |
| 8 FSV04 | 2 | 1 - 0 - 1 | 1 | 1 | 0 | 3 |
| 9 B36 | 2 | 0 - 0 - 2 | 1 | 3 | -2 | 0 |
| 10 GÍ | 2 | 0 - 0 - 2 | 5 | 15 | -10 | 0 |

# Hagtalsfavorittar

| | 04 | 03 | 02 | 01 | 00 | 99 | 98 | 97 | 96 | 95 | Í alt | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| B36-HB | 2-5 | 0-2 | 1-2 | 1-0 | 1-2 | 0-2 | 0-1 | 2-3 | 2-0 | 0-5 | 2-0-8 | 9-22 |
| NSÍ-Skála | 2-0 | 2-0 | 3-1 | - | - | - | - | - | - | - | 3-0-0 | 7-1 |
| TB-GÍ | - | - | 0-3 | - | - | - | 3-1 | - | 0-3 | 1-0 | 2-0-2 | 4-7 |
| EB/S-VB | 0-2 | 2-0 | 0-1 | 1-3 | - | - | - | - | - | - | 1-0-3 | 3-6 |
| ÍF-KÍ | 1-6 | - | - | - | - | 0-1 | 0-0 | 1-9 | 1-2 | - | 0-1-4 | 3-18 |

Skal metast eftir hagtølunum, so er talan um nakrar greiðar favorittar um hvítusunnuna, tó at stigatalvan ikki gevur heilt so greiðar ábendingar um hetta sama.

Í Havn hevur HB vanliga havt sera gott tak á grannunum. Ikki minst er hetta komið til sjóndar, tá B36 hevur átt dystin. Her hevur bert eydnast B36 at fáa stig tvær ferðir seinnu árini.

Og hjá Skála stendur uppaftur verri til, tá ferðast skal til Runavík. Her hevur NSÍ nevnliga fulla úrtøku. Nakað sum eisini er støðan, um dystirnir hjá NSÍ á Skála verða taldir við.

Og skal KÍ venda gongdini, so verður hetta helst gjørt í Fuglafirð, har teir ikki hava tapt síðani 1993, og har talan eisini hevur verið um onkrar trivaligar sigrar.

Hinvegin tykist gongdin vera meira jøvn til hinar báðar dystirnar. VB hevur tó havt eina lítla yvirvág á Eiði, meðan tað hevur verið javnt býtt hjá TB og GÍ á Sevmýri.

Talvan sýnir, hvussu tað hevur gingist, tá mótstøðuliðini mánadagin hava tørnað saman í tilsvarandi dystunum seinastu tíggju árini.

-jm